# Kann gerast ein varði í føroyskum vinnulívi

**Føroyingar hugsa ikki bara um tað, sum hevur stert. Størsta frambrotinum í føroyskum vinnulívi í ár, stóð ein teldufyritøka fyri**

ÁRSINS ÁTAK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ofta verður sagt, at føroyingar hugsa bara um tað, sum hevur stert.

Tað passar nokk so væl. Men tað passar ikki heilt.

Tvørturímóti var tað innan telduheimin, at tað størsta vinnuliga frambrotið í føroyskum vinnulívi í ár hendi.

Tað heldur í hvussu so er Vinnuhúsið.

Fríggjadagin útnevndi Vinnuhúsið Vaðhorn Seafood á Strondum til at vera ársins virki.

Men samstundis hevur vinnuhúsið eisini gjørt av at heiðra eina aðra fyritøku fyri at hava staðið fyri ársins átaki í føroyska vinnulívinum.

Og hendan heiðurin fekk teldufyritøkan Formula. fo í Havn.

Hesin heiðurin verður ikki minni av at tað ikki er á hvørjum ári, at heiðurslønin fyri ársins átak verður latin.



*Føroyska teldufritøkan Formula hevur sett sær høg mál og tí er tað neyðugt hjá okkum at líta út í heim, sigur Torkil Holm Petersen, stjóri á Formula fo. Her er hann í Norðurlandahúsinum fríggjadagin, tá ið fyritøka hansara vann heiðurin av at standa fyri ársins átaki hjá føroyskum vinnulívi í ár*

### Hava tikið stór tøk

Vinnuhúsið hevur frá fyrsta degi boðað frá, at Føroyar eru so lítlar, at tað verður ikki á hvørjum ári at hendan virðislønin verður latin.

– Men henda trupulleika hava vit ikki í ár, sigur Vinnuhúsið.

Endamálið við ársins átaki er at heiðra eitt virkið ella eitt fólk, sum hevur gjørt eitt serligt átak til frama fyri vinnulívið.

Hóast nakrar vinnugreinar hava havt tað trupult í ár, eru tað eisini nógvar aðrar, ið hava tikið stór tøk.

Nøkur reiðarí hava útvegað nýggj fiskiskip, Norrøna er komin til landið og privat felag hevur sett rættiliga gongd á at vinna orku burturúr vindi.

– Vit hava leingi tosað um alternativar vinnur. Útflutning, sum ikki hevur stert. Men higartil vísa útflutningstølini, at enn hevur tað mest verið talan um tos. Kortini metir dómsnevndin hjá Vinnuhúsinum, at tað størsta nýskapandi frambrotið í føroyskum vinnulívi í farna árið, hendi í KT vinnuni.

Hetta hendi, tá ið Formula.fo fekk í lag samstarvsavtalu við altjóða risafyritøkuna Siemens um at marknaðarføra og selja eitt serligt forrit, sum føroyska telduvirkið hevur ment .

### Trýr uppá føroysku fyritøkuna

Talan er um forritið »Total View«, sum hevur til endamáls at gera alt telefonsamskiftið hjá einum virki við viðskiftafólki nógv effektivari.

Og hendan skipanin er so góð, at enntá Siemens hevur fingið áhuga fyri hana og hevur bjóða sær til at selja og marknaðarføra hana fyri Formula.

– At Formula sleppur inn á sølunetið hjá Siemens, ger, at Formula kann brúka orkuna uppá at støðugt at menna forritið, sum er teirra styrki, samstundis sum Siemens tekur sær av marknaðarføringini, við teimum royndum, tey hava. Dómsnevndin hjá vinnuhúsinum sigur, at tað sum er serstakt í hesum máli, er, at innan telefonsamskifti, er tað bara »Total View«, sum hevur hesa støðu hjá Siemens.

Og dómsnevndin heldur, at hetta er eitt avrik, sum er vert at heiðra sum Ársins Átak.

– Fyri føroyskan KT útflutning, kann avtalan við Simens gerast ein varði, sigur dómsnevndin hjá Vinnuhúsinum.

**Stutt um**

## »Total view«

Forritið hjá Formula, sum hevur fingið heitið »Total View« og sum Siemens hevur átikið sær at selja, er eitt forritt, sum kollveltir telefonsamskiftið ímillum eina fyritøku og viðskiftafólkini hjá fyritøkuni.

Í stuttum er hetta gjørt við at tann sum tekur telefonina sær á telduni, hvør tað er sum ringir.

Á telduskerminum sæst millum annnað eisini, hvør í fyritøkuni síðst hevur tosað við hetta fólkið og um tað starvsfólkið, tað vil hava fatur á, er í húsinum, um tað er bundið, ella um tað situr á fundi.

Møguleiki er eisini at víðaristilla telefonina til fartelefonina hjá starvsfólkinum. Og skal boð leggjast til starvsfólkið, tí tað ikki er at hitta júst tá, ger teldan av sær sjálvum ein teldupost kláran til starvsfólkið um at ringja til hetta fólkið, ið hevur ringt.

Úrslitið av skipanini er betri arbeiðsumhvørvið, betri tænasta til viðskiftafólkini, lægri kostnaður og størri smidleiki.

# Hava satsað nógv fyri at sleppa út í heimin

**– Vit hava sett okkum høg mál og tí ert tað neyðugt hjá okkum at líta út í heim, sigur Torkil Holm Petersen, stjóri á Formula í Havn**

ÁRSINS ÁTAK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á føroyska telduvirkinum, Formula, hava tey sett sær høg mál.

Men fyri at røkka málum, hava tey eisini verið til reiðar at vága nakað.

Úrslitið av hesum fekk Formula fyrr í ár, tá ið tey sluppu inn í hitan hjá størstu fyritøku í Evropa, sum er týska fyritøkan, Siemens, ið hevur starvsfólk í hundraðtúsundatali í nógvum londum.

Fríggjadagin fekk Formula eina viðurkenning afturat, tá ið ein dómsnevnd undir Vinnuhúsinum gjørdi av, at velja samstarvsavtaluna ímillum Formula og Siemens til ársins átak í føroyskum vinnulívi í ár.

Formula Fo, sum hevur stívliga 20 ár á baki, er størsta telduvirki í Føroyum. Tað arbeiða 62 fólk í fyritøkuni, sum seldi fyri 88 milliónir í fjør.

### Hava stór mál

– Sum størsta fyritøka í landinum á hesum øki, eiga vit at ganga á odda og at vísa á nýggjar leiðir, sigur Torkil Holm Petersen, stjóri í Formula.

Hann dylir ikki fyri, at tey á Formula hava sett sær høg mál.

– Og hóast føroyski marknaðurin als ikki skal undirmetast, verður tað neyðugt hjá okkum at royna at fáa vørur okkara út í heim, tí tað skerst ikki burtur, at føroyski marknaðurin er ikki so stórur.

– Hin møguleikin er at seta sær lægri mál, men tað hava vit ikki hug til.

Torkil Holm Petersen sigur, at tað er dýrt at seta sær høg mál.

Men eitt úrslit av hesum er forritið »Total View«, sum Formula hevur ment og sum stóra fyritøkan, Siemens, nú skal selja fyri tey, eins og vit hava greitt frá í aðrari grein í blaðnum.

Hann vil ikki siga, hvussu nógv tað hevur kostað at ment forritið »Total View«, men hann sigur, at tað hevur kostað eina tveysiffraða millióna-upphædd og at tað hevur tikið teimum seks ár.

– Skulu vit framvegis hava so høg mál, sum vit vilja hava, verður tað sostatt neyðugt at líta út í heim.

Í hesum førum hevði Siemens ment ein nýggjan telefonvekslara, men teir høvdu onki forrit til hann og tað endaði so við, at Siemens fekk so stóran áhuga fyri okkara forriti, at tey vilja selja tað fyri okkum, sigur Torkil Holm Petersen.

### Útlitini góð

Hinvegin verður forritið »Total View« eisini selt í Føroyum.

Og Torkil Holm Petersen er ikki minst fegin um søluna á heimamarknaðinum.

– Tað ger tað møguligt hjá okkum at menna forritið hjá góðum og krevjandi samstarvsfeløgum í nærumhvørvinum.

Hann nevnir eitt nú, at Mentamálaráðið brúkar skipanina og tað eru teir avbera fegnir um, tí tað hevur gjørt, at tað ber til at menna forritið, so at tað er heilt liðugt, áðrenn tað fer út í heim.

– At vit hava fingið eina fyritøku sum Siemens at selja forritið, er eisini ein fortreyt fyri at tað skal eydnast, tí hon er stór og sterk og marknaðarføringin er so dýr, at tað er næstan vónleyst hjá eini fyritøku sum okkara.

Men tað hevur eisini tann fyrimun, at so kann Formula brúka alla orku uppá at menna forritið alla tíðina.

– Endamálið er at byggja forritið úr og at koma við nýggjum útgávum javnan, so at tey, sum brúka tað, fáa størri og størri gleði av tí alla tíðina.

– Men at vit eisini fáa selt tað uttanlands, hevur so eisini tað við sær, at tað ber til at selja tað í Føroyum fyri sama prís, sum tað verður selt uttanlands. Og skuldi tað bara verðið selt í Føroyum, hevði tað verðið nógv dýrari. Tað er ógvuliga dýrt at menna slík forrit og skal tað gerast til føroyska marknaðin burturavav, hevði prísurin verðið lutfalsliga høgur fyri at vinna útreiðslurnar innaftur, tí at føroyski marknaðurin ikki so stórur.

Stjórin á Formula sigur, at enn verður »Total View« selt í Danmark, Noregi og í Svøríki. Seinni verður tað eisini selt í øðrum londum.

Og fyribils er hann væl nøgdur við úrslitið, tí hóast forritið kom á marknaðin fyrr í ár, hevur undirtøkan verið góð. Kortini heldur hann, at tað gongur eitt ár, áðrenn tað ber til at siga, hvussu úrslitið verður. Men útlitini eru góð.

Total View er ikki einasta forrit, sum Formula selur uttanlands. Torkil Holm Petersen nevnir eitt nú, at eitt annað forrit hjá Formula, sum eitur Patsec, og sum er til sjúkrahús, verður eisini nokk so nógv selt og í Danmark eru tað nú eini 45% av sjúkrahúsunum, sum brúka tað.



# Starvsbólkar forða barnamenning

**Fak- og starvsbólkar, ið fáast við børn, arbeiða hvør í sínum lagi, og tað er størsta forðingin fyri, at nakað munagott verður gjørt við stóru trupulleikarnar, sum alt ov nógv børn í Føroyum hava. Tað sigur Finnur Helmsdal, leiðari á Barnaheiminum. Samskipan og samstarv eru lyklaorð, skal komast víðari**

PSYKIATRIVIKA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Nógvar føroyskar familjur virka ikki nóg væl, og tað eru børnini, sum rinda høga prísin.

Tað var greiði boðskapurin frá Finni Helmsdal, leiðara á Føroya barnaheimi, tá hann helt tann fyrsta fyrilesturin í Psykiatrivikuni, sum varð sett í Útvarpshøllini mánakvøldið. Eini 70 fólk vóru møtt. Nógv ymisk evni undir heitinum »Gevið sinninum gætur« vera tikin upp, og Finnur Helmsdal legði fyri við børnunum.




*Børnini kunnu ikki bíða longur, sigur Finnur Helmsdal, leiðari á Barnaheiminum, sum helt fyrsta fyrilesturin á Psykiatrivikuni*

*Mynd: Jens K. Vang*

### Alt ov nógv

Børnini kunnu ikki bíða longur, heldur Finnur Helmsdal, og vit hava øll ábyrgdina.

– Eg havi eingi hagtøl at vísa á, tí á hesum øki eru Føroyar eitt menningarland. Men út frá egnum royndum vil eg pástanda, at alt ov nógvar familjur í Føroyum virka ov illa. Alt ov nógv børn í Føroyum rinda ein sera høgan prís. Og hóast nógv orka verður løgd í, so er úrslitið langt frá nøktandi, sigur Finnur Helmsdal bersøgin.

Avleiðingin av skeivu gongdini er, at nógv børn og ung trívast illa. Tey mennast seint ella skeivt og hava ilt við at klára seg. Summi gerast atferðartrupul og alt ov nógv fáa sálarligar trupulleikar.

Tað vísir seg at vera trupult hjá mongum at stovna vælvirkandi familjur, sigur Finnur Helmsdal, og tíðin er komin at gera nakað álvarsligt.

### Tekin í álvara

Spurningurin er, hví tað er komið so langt. Hví fáa børnini ikki hjálp nógv fyrr, tá talan er um viðurskifti, sum er teimum til ampa og beinleiðis kann gerast lívshættisligt.

– Øgiliga ofta hoyra vit, at trupulleikin er duldur. Vit fáa ikki eyga á hann, fyrr enn ballónin brestur. Tað ber ofta til at siga, hvussu tað fer at laga seg hjá onkrum familjum, men tað ber ikki altíð til at síggja trupulleikan. Atburðurin hjá børnum kann siga okkum nógv, men ofta verður einki gjørt, fyrr enn tað er ov seint, sigur Finnur Helmsdal.

Tekin skulu takast í álvara. Tá ið vit tosa um umsorganarsvík eru nógv tekin at hyggja eftir. Likamligur ágangurin hevur ofta sjónlig tekin. Sálarligur ágangur snýr seg eitt nú um trýst, misnýtslu hjá foreldrum ella harðskap millum foreldur. Kynsligur ágangur fyrigongur oftast í tí dulda. Og so er tað kenslulig vanrøkt.

Hvat er tað vit skulu duga at síggja? Børn og ung í vanda kunnu hava trupulleikar við rúsdrekka, tey virða kanska ikki mørk, nýta harðskap uttan grund ella megna ikki at verja seg.

– Yvirlivarar klára alt, men tey flestu vera meira og minni merkt av umsorganarsvíki. Nógv fáa trupulleikar at dragast við, men tað ber til at fyribyrgja. Fyribyrging er ein frasa, eg veit, men ov lítið verður gjørt fyri at fyribyrgja. Tað er lívsneyðugt, tí fyribyrgja vit ikki, so er ov seint. Og tað skal byrja so tíðliga, sum tilber, sigur Finnur Helmsdal.

### Við botni fyri eyguni

Samskipan og samstarv eru lyklaorð. Finnur Helmsdal sigur, at tað ikki er vantandi orka, sum ger, at trupulleikarnir hjá børnum sleppa ígjøgnum alla skipanina. Tí ein rúgva av fólkum hava sum starv burturav av at fáast við børn.

– Um vit taldu saman, hvussu nógv eru um børnini, frá tí tey verða fødd til tey eru vaksin, so høvdu vit dottið av stólinum. Men onkursvegna sleppa trupulleikarnir ofta gjøgnum. Jarðamøður, heilsusystrar, pedagogar, sjúkrasystrar og lærarar eru óivað øll umhugsin og gera eitt gott arbeiði. Men tíverri sleppur trupulleikin ofta ígjøgnum, uttan at nakar gera nakað við hann, sigur Finnur Helmsdal.

Talan er um ein hóp av fólki og peningurin, ið brúktur verður, er eisini nógvur, hóast tað kundi verið meira av báðum. Men trupulleikin er, at øll arbeiða eftir sínum forskriftum við hvør sínum serligum endamáli.

– Her eingin samskipan! Mangan eru forðingar í ymisku fakbólkunum. Hvør fakbólkur hevur sínar visjónir, men tær verða hildnar innan fyri mark. Tíverri verður ikki arbeitt út frá, hvussu barnið hevur tað aðrastaðni. Fólk ganga við botni fyri eyguni og hyggja ikki inn á grannaøkið. Vit gera øll okkara besta, men var innsatsurin samskipaður, so gagnaði tað børnunum og familjunum nógv betur, sigur Finnur Helmsdal.

Tað snýr seg ikki um at broyta arbeiðsuppgávur. Tað er einki galið við dagliga arbeiðnum. Men fólk og starvsbólkar mugu og skulu lata sína vitan um eitt barn fara víðari til aðrar fakbólkar.

### Alneyðug fráboðan

Nýggja barnaverndarlógin kann gerast eitt amboð. Øll hava longu nú eina fráboðanarskyldu, um tey gerast varug við, at eitt barn er misrøkt, men í nýggju lógini, sum er til viðgerðar í løgtinginum, er hendan fráboðanarskyldan útgreinað.

Øll starvsfólk hava skyldu undir navni at boða frá, um tey vita um viðurskifti, sum eru ein ampi hjá barninum. Onnur kunnu ónavngivin boða frá, men øll skulu! Talan er um viðurskifti, har tilveran hjá barninum er hótt. Nýggja lógin umrøður eisini kanningararbeiðið, tíðarfreistir og tvørfakligt samstarv. Eydnast tað at fáa hetta at virka, so er nógv vunnið, heldur Finnur Helmsdal.

– Spurningurin er, hví tað hevur verið so torført at fáa fakbólkar at boða øðrum frá sínari vitan. Tagnarskyldan er ein orsøk og klientálit ein onnur. Í triðja lagi hoyra vit ofta, at tað er ein vantandi tiltrúgv til, at nakað hendir. Tagnarskyldan skal sjálvandi virðast, men alt hevur sítt mark, og er tilveran hjá barninum hótt, er farið um tað markið, sigur Finnur Helmsdal.

### Vanta barnapsykiatri

Samskipan og samstarv má fáast at virka, áðrenn fráboðanarskyldan virkar. Og í hesum føri heldur Finnur Helmsdal tað vera alneyðugt, at vit fara burtur frá at hava 47 barnaverndir í Føroyum.

– Tað er eitt stórt minus, men mín vón er, at tað vera færri barnaverndir um nøkur ár. Tí tað ber ikki til at arbeiða við barnavernd í kommunum, har tað búgva 200 fólk. Alt er samanvavt, og tí mugu vit hava størri eindir, sigur Finnur Helmsdal.

Hann hevur sjálvur eitt hugskot til, hvussu tað kann virka betur. Ein felags sosial deild skal gerast fyri hvørt størri øki. Øll, sum onkursvegna eru um børn, hava skyldu til at boða sosialu deildini frá. Tað kunnu vera pedagogar, prestar, feløg, lærarar, jarðamøður, sálarfrøðingar, familja, grannar og onnur.

Tríggir kanningardeplar skulu síðan gera tær kanningarnar, sum eru neyðugar, fyri at staðfesta trupulleikarnar og hjálpa barninum. Vit hava longu Sernámsdepilin og ein familjustovn, har kanningar kunnu gerast. Síðan skal eisini ein barna- og ungdómspsykiatri setast á stovn.

– Tað er alneyðugt, at ein barna- og ungdómspsykiatri fæst at virka í Føroyum, tí skipanin, vit hava, við vitjan av barnapsykiatara tvær ferðir um árið, er langt frá nøktandi. Í dag koma vit út fyri, at børn verða lagd á deild tvey á psykiatisku deild ella flutt av landinum, meðan tey vera kannað, og tað ger bara skaðan størri, sigur Finnur Helmsdal.